# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Mammon fram um morgunlestur

Nýggja leiðslan í Kringvarpinum hevur gjørt tað til ein aðaltátt, at almenna útvarpið ikki skal missa lurtarar til aðrar útvarpsrásir. Tað segði stjórin í Degi og Viku. Mentanarnevndin hjá Løgtinginum gjørdi annars eina semju um, at ongar broytingar skuldu gerast í kringvarpinum, fyrr enn ein public service avtala var gjørd. Semja var eisini um, at Kringvarpið ikki skal kappast við privatu miðlarnar um handilslýsingar. Hinvegin skulu hesar niðurlagast eftir fimm árum – og eftir tingsins vilja verða ongar lýsingar í kringvarpinum um trý ár.

Men hetta er ikki fallið í góða jørð hjá nýggju kringvarpsleiðsluni. Sambært orðaskiftinum á tingi er Kringvarpið á veg við eini kapanju, har tey fara at dubba lýsingainnsatsin í beinleiðis – og ójavnari – kapping við privatu miðlarnar.

Tað var kortini stríðið um morgunlesturin, sum rættiliga festi eld í fjúsið. Kringvarpsstjórin gjørdi helst eitt sjálvmál, tá hon alment boðaði frá, at morgunlesturin klokkan 9:50 ger, at fólk skifta rás. Ergo: At summi ditta sær at lurta eftir til dømis Rás2. Við at fyribyrgja hesum er gøtan greidd hjá kringvarpinum at hapsa lýsingamarknaðin frá Rás2.

Hetta er public service, sum vil nakað! Eitt kringvarp, sum er skattainnkrevji, brúkar alla sína orku at knúsa fíggjarliga grundarlagið undir eini privatari radiostøð. Við yvir 70 milliónum í rygginum, skal hesin mastodonturin leggjast á allan lýsingamarknaðin, sum hann yvir høvur ikki hevur rætt til. Í ongum øðrum landi hevði slíkt borið til!

Í Føroyum verða privatir miðlar ikki stuðlaðir fíggjarliga. Aðrastaðni eru vanligt, at politiski myndugleikin beinleiðis stuðlar undir fjølbroytni á miðlamarknaðinum – tí miðlarnir eru ein av hornasteinunum í demokratinum.

Umframt tvangskravda brúkaragjaldið fær Kringvarpið eitt komplett útvarpssendinet og eitt komplett sjónvarpssendinet frá tí almenna. Rás2 rindar sjálvt sítt sendinet, og einasta inntøkan er lýsingainntøkan, sum Kringvarpið nú ætlar sær.

Har var ein ferðil av stirli at hóma hjá mentamálaráðharranum í gjár. Øll tingfólk tyktust at vera samd – bæði um morgunlesturin og um parodiina í, at Kringvarpið skal køva privatu miðlarnar við almennum skattakrónum. So kanska sleppur eigarin av Kringvarpi Føroya at ráða, hóast nýggja leiðslan lítið tykist leggja í tað.

**Sosialurin**

## Iktus, Rás 2, Lindin, R2 net, Televarpið og KODA

**KÁRI BÆK**
Göteborg



So var aftur galið við KODA (les føroyskir/danskir lagsmiðir og sangrithøvundar).

Í greinini í Sosialinum 15. januar 2009 gremur umboð fyri Iktus seg um, at tað er so dýrt at sleppa at spæla tónleik í teirra sendingunum.

Aftur her hoyra vit sama grenjið um, at vit eru so fá og smá í Føroyum, at vit eiga at hava serreglur og eiga at sleppa frá at gjalda fyri at spæla tónleik. Og so kemur hetta við, at KODA bara tekur pengar frá føroyinum og bert betalir ca. 10% aftur.

Sannleikin um hetta er sjálvandi, at bert 10% av tónleikinum, sum føroysku rásirnar spæla, er føroyskur tónleikur. Spæla tit meira føroyskt, verður eisini meira í lumman hjá føroyskum tónasmiðum og rithøvundum!

At uppfordra myndugleikarnar at gera eina føroyska lóggávu, sum forðar fyri at goldið verður til rættindahavarnar, er tað reina piratvirksemi. Hevur man ikki ráð at gjalda tað, sum tað kostar, er betri onki at senda, sum Iktus jú eisini skjýtur upp. Ella at spæla gamlan tónleik – ikki 50 ár gamlan tónleik, sum tað stendur í greinini, men 70 ár eftir at lagsmiðurin er deyður er tónleikurin fríur at nýta.

Mín vón er, at lógarsmiðirnir í Føroyum eru so mikið at sær komnir, at teir ikki geva eftir fyri trýsti frá teimum (Iktus, Rás2, Televarpinum osfr), sum bara vilja sleppa bíliga at brúka tónleikin og royna at pakka tað inn við, at so fáa føroyingar nógv meira í sín part.

Tey sum skapa textir og tónleik hava uppiborðið at fáa tað sindrið burturúr, tá teirra tónleikur verður spældur alment. Latið upphavsrættindalógina vera verja hjá upphavsrættindahavarunum og ongum øðrum.

## Hvussu bjarga vit Føroyum

**JÓI WINTHER**



Nú eru so verri tíðir aftur, og skjerjast skal av fíggjarlógini.

Hvussu skulu vit nú gera hetta?

Fróðskaparsetrið kunnu vit ikki skerja, siga tey klóku.

Skúlin skal minst hava tað sama.

Øll skulu hava tað sama, og eitt sindur afturat, heldur fjøldin, og eingin vil gjalda.

Kanska tær 360 milliónirnar um árið, sum loysingarflokkarnir skóru av blokkinum, er tað ið manglar? Tað kann sigast sum dømi, at tað eru tvær sandoyartunnellir hvørt valskeið, sum teir kastaðu burtur.

Nú mugu vit eisini gjalda eyka fyri at tey, sum eru og lesa og skulu koma heim aftur. Tey vilja hava útlandsins »goder« við sær heim.

Vónandi hava tey ikki forroknað seg, so at tann ið skal føða tey, má rýma av landinum av svongd?

Í Íslandi hava tey sjálvandi sett lønina eftir, hvat landið kann bera, so har mugu tey bert arbeiða tað meira. Hetta er ikki bert galdandi fyri arbeiðaran, men fyri fjøldina. At so nakrir spekulantar koyrdu teir á reyvina, tað kenna vit eisini til. Vit skulu øll gjalda eyka í Føroyum, av tí at bankaslipsamenninir skuldu spæla stórir og fóru fyri knøppum ári síðani og tóku stór lán fyri at læna víðari. Teir sita tryggari í teirra sessum, enn almennir og aðrir privatirstjórar.

| Løn nú | Løn aftaná regulering |
|---|---|
| 30.000 | 25.000 |
| 35.000 | 26.000 |
| 40.000 | 27.000 |
| 45.000 | 28.000 |
| 50.000 | 29.000 |
| 55.000 | 30.000 |
| 60.000 | 31.000 |
| 70.000 | 32.000 |
| 80.000 | 33.000 |

Nú vit skóru 360 milliónir av blokkinum, so skuldu vit sjálvandi lækka topplønirnar, tað vil siga lønirnar frá 30.000 krónur og upp eftir, og at allur almennur og privatur pensiónspeningur verður latin Samhaldsfasta.

Eitt dømi uppá lønarniðurskur: *Sí talvu*

**Her eru 3 møguleikar:**

**1.** Lækka lønirnar so er trupuleikin loystur

**2.** Biðja Danskarirnar um at hækka blokkstuðulin aftur

**3.** Taka sum mest frá teimun gomlu, og lata tey liggja óhjálpin.

Hvat ynskja vit.

## Hvør hevur rætt?

**TRYGVI F. GUTTESEN**



Lis Mortensen, forkvinna í stýrinum fyri Fróðskaparsetrinum sigur, at stovnurin verður skerdur við fimm milliónum kr. fyri 2009 og at avleiðingin av hesum kann vera, at Søgu- og Samfelagsdeildin verður niðurløgd og at átta fólk verða søgd úr starvi. Men hetta er bara eitt av fleiri worst case scenarium sigur Lis Mortensen.

Anfinn Kallsberg, formaður í løgtingsins fíggjarnevnd, er ikki samdur, hann sigur at Fróðskaparsetrið hevur fingið 4.600.000,00 kr. meira í 2009 enn hvat setrið brúkti í 2008 ella 26% meira í 2009 enn í 2008.

Hvussu ber tað til at tølini hjá Lis og Anfinn liggja heili 9,6 milliónir frá hvørjum øðrum?

Vit eru mong, ið fegin vilja vita hvør hevur rætt, Lis Mortensen ella Anfinn Kallsberg?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.